# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hera Niclasen til minnis

15. februar bórust tíðindini, at Heri Niclasen var deyður. Hóast sorgarboðini ikki komu óvart, gekk eitt andarhald áðrenn døpru boðini gjørdist veruleiki. Skilamaðurin Heri var ikki millum okkum longur.

Hóast Heri ikki gjørdi nógv hóvasták úr sær sjálvum, so var hansara blídliga og vinsæla medferð ein fyrimynd. Hann tøldi fólka at sær. Gav sínum medmenniskjum kensluna góðum hjartalagi. Tí verður hann eisini saknaður av mongum.



Heri var útbúgvin telegrafistur, og arbeiddi hann nógv ár í Grønlandi og seinni í Lyngby Radio. Í 1984 flutti hann við familjuni aftur til Føroya í starv hjá Smyril Line, og starvaðist hann har, til hann gjørdist marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi í 1997.

Í apríl 2000 gjørdist Heri stjóri á Ferðaráðnum, og kom hann soleiðis at starvast undir ábyrgdarøkinum hjá Vinnumálaráðnum. Og her lá hansara partur ikki eftir.

Tað var sjónligt, at hann kendi seg væl í starvinum á Ferðaráðnum, at hann har kundi nýta bæði vitan og menniskjaligar eginleikar at knýta sambond innanoyggja og ikki minst til umheimin.

Sum stjóri á Ferðaráðnum kundi Heri skoða, at ferðavinnan støðugt hevði framgongd, og sum fráleið er vorðin ein verulig inntøkukelda fyri samfelagið, har vit í dag staðfesta, at hundraðtals landsmenn fáa sína ársinntøku úr hesi vinnu, sum helst nú er vorðin næststørsta einstaka inntøkukelda í samfelagnum.

Men Heri vildi meira. Hann setti sær fyri at menna karmarnar, har ferðavinnan, saman við tí almenna, veruliga kundi seta Føroyar á heimskortið sum ferðamannamál, skipað eftir leisti, sum eitt nú íslendingar við stórum hepni hava framt. Eisini var tað eitt av hansara hjartamálum at samstarva við londini í útnorði á ferðavinnuøkinum. Eitt samstarv hann trúði uppá, og sum óivað hevur nógvar ótroyttar møguleikar at oysa av.

Í sínum arbeiði var Heri trúfastur og álítandi. Tá avgerð í fyrraárið varð tikin um at kanna samskipan av virkseminum hjá Ferðaráðnum og Menningarstovuni, var Heri sjálvsagdur at luttaka í fyrireikingunum. Hansara arbeiði lá heldur ikki eftir. Hóast møgulig umskipan kundi ávirka leiðslufunktiónina á Ferðaráðnum, so var hansara loyalitetur móti menningini av ferðavinnuni eyðsýndur. Hann sá møguleikarnar í sjónarringinum. Hann visti, at ferðavinnan undir nýggjum bygnaði skjótari fór at røkka teimum møguleikum, sum vóru hansara hjartamál. Tí var Heri íblástur í teimum fyrireikingum, sum hann luttók í. Visti óivað, at hann breyt úr nýggjum og soleiðis legði lunnar undir nýhugsan í tí virksemi, hann virkaði og livdi fyri.

Í gerandisprátі var Heri eisini skemtingarsamur og hittinorðaður. Hansara blídliga lyndi og høviski atburður gjørdi, at fólk kendu seg væl í samveru við hann. At Heri var vællýddur og átti stóran vinarskara, burturi sum heima, var sjónligt tann dagin, hann var borin til sítt seinasta hvíldarstað. Úr øllum landinum og uttan úr heimi vóru fólk komin til jarðarferðina at vísa Hera seinasta heiðurin.

Sjálvur hevði eg manga ríkandi samrøðu við Hera, har hann gjørdi sínar metingar um tey viðurskifti, sum kundi fjøltátta ferðavinnuna og sum annars vóru uppi í tíðini. Heri var sakligur og trúgvur av lyndi. Í samskiftinum við síni medmenniskju ein fyrimynd.

Tað er við sorgblídni at hesar reglur verða feldar á blað. Við ynski um samhuga til tykkara og Harrans signing, sum mist hava, vil eg lýsa frið yvir minnið um Hera Niclasen.

**Bjarni Djurholm**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Lenu Thomsen í Króki, Hvalba,** fer úr Kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í kvøld kl. 19. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar Kirkju leygardagin 18. mars kl. 14. Tey, ið vilja minnast Lenu, kunnu lata eina gávu til Hvalbiar Missiónshús, konto í Føroya Banka

Kistan við **Randi Kristensen á Tvøroyri** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin 17. mars kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyar kirkju leygardagin 18. mars klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Randi kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti Krabbameini. Konta í peningagstovunum.

**Jón Hansen, Leirvík,** andaðist hósdagin 16. mars, 68 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Magnus Ennistíg, Klaksvík,** andaðist týsdagin 14. mars á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 80 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í kvøld kl. 18 heim í Betesda. Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin 18. mars kl. 13:30. Tey, ið vilja minnast Magnus kunnu lata Zarepta eina gávu konto í peningastovununum.

Kistan við **Karl Mortensen, Toftalíð** í Vági, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Karl, kunnu lata Missiónshúsinum í Vági eina peningagávu. Konta í Suðuroyar Sparikassa.

**Jóhan Christan Dam,** málarameistari vanliga nevndur Hanne-kis, ættaður úr Porkeri, búsitandi í Havn, andaðist í nátt 16. mars, 71 ára gamal.

**Dagurin í morgin**

**18. mars. Aleksander**, deyður umleið 250. Úr Aleksandriu og endaði sum biskupur í Jerúsalem. Fleiri ferðir varð hann atsøktur fyri trúgv sína, men komst undan og doyði ein natúrligan deyða, og varð blóðvitni uttan blóð, sum tikið varð til.

**19. mars. Jósef.** Dagurin hildin til minnis um festarmannin hjá Mariu Moy. Hann gjørdist, sum vera man, halgimenni hjá húsasmiðum og handverksmonnum. Bíbilska navnið merkir Guð lati meg fjølgast.

**20. mars.** Gordius, deyður umleið 300. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Jóhan Christian Dam**
málarameistari,
vanliga nevndur Hannekis

andaðist hósdagin 16. mars, 71 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin 18. mars kl. 18.00
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin 19. mars kl. 14.00.

**Ása**
**Herman, Poul og Marian**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Magnussen**
Tjørnuvík

andaðist og varð jarðaður.

Hjartans tøkk til Hilmar Bech fyri góð og troystarrík orð í heiminum og Martin Restorff Jacobsen prest, í kirkjuni.
Tøkk til tey, sum vitjaðu hann til tað seinasta.
Tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk fyri blómur, heilsanir og peningagávur til Tjørnuvíkar kirkju.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul!

**Thora**
**Steinbjørn, Hensar, Arnbjørg og Tórhild**